UTTAN ÚR HEIMI

# Vápnaðir menn rændu býbuss



*26 ferðafólk vóru í bussinum, sum teir báðir menninir rændu tíðliga gjáramorgunin*
*Mynd: Reuters*

**Tíðliga gjáramorgunin rændu tveir vápnaðir menn ein býbuss við 26 ferðafólkum í Athen**

BUSSRÁN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Teir báðir menninir komu upp í bussin í býarpartinum Marathon stutt fyri klokkan fimm grikska tíð og góvu bussførararanum boð um at steðga. Lítla løtu seinni hevði løgreglan kringsett bussin, og alvápnaðir løgreglumenn við maskinbyrsum stóðu á varðhaldi fram við vegnum.

Nakað seinni eydnaðist tað bussførararanum at sleppa til rýmingar, og fyrrapartin gjørdu gíslarænararnir av at lata fimm av ferðafólkunum sleppa úr bussinum.

Frammanundan høvdu teir kravt at fáa ein bussførara, og at løgreglan skuldi loyva teimum at koyra út í altjóða floghavnina í Athen. Grikska løgreglan helt upprunaliga, at gíslarænararnir vóru albanar, men seinni kom fram, at teir vósu russar, og at teir ætlaðu sær til Russlands við flogfari.

Nakað fyri middag eydnaðist tað griksku løgregluni at fáa samband við teir báðar menninar, og roynt varð at fáa teir at lata ferðafólkini sleppa úr bussinum. Hesar tingingarnar vóru ikki lidnar, tá blaðið fór til prentingar.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at vápnaðir menn hava rænt bussar í Grikkalandi. Tað hendi bæði í 1999 og 2000.

# Kravdu skiparan koyrdan í land

**Fyri fyrstu ferð í meiri enn 70 ár er skiparin á einum bretskum herskipi koyrdur í land, tí vandi var fyri, at manningin fór at gera uppreistur ímóti honum**

HERSKIP
*Árni Joensen*

Leiðslan í bretska herflotanum roynir at leggja ein doyvara á tíðindini um, at skiparin á freghattini HMS "Somerset" bleiv koyrdur í land herfyri, men bretsku fjølmiðlarnir gera nógv burtur úr tilburðinum.

HMS "Somerset" var á veg til Bretlands eftir at hava verið í Persaflógv-anum, men tá skipið kom til Gibraltar, fek tað boð um at fara inn, og har fekk skiparin, David Axon, sekkin. Sambært fjølmiðlunum bleiv hann tveittur í land, tí manningin hevði hótt við at gera uppreistur ímóti honum. Sum skilst vildu fleiri av yvirmonnunum ikki góðtaka harðrendu framferðina hjá skiparanum, men nógvir bretar spyrja, hvat veruliga hendi umborð á skipinum.

Sambært fjølmiðlunum er hetta fyrstu ferð síðani 1931, at trupulleikar hava verið umborð á einum bretskum herskipi. David Axon kemur eftir øllum at døma fyri ein krígsrætt.

## Metstórt hall

Hallið á amerikanska handilsjavnanum tíggju teir fyrstu mánaðarnar í ár var metstórt. Uppgerðin hjá handilsmálaráð-num í Washington vísir, at hallið var 500, 5 milliardir dollarar ella 2.794 milliardir krónur. Tað merkir, at hallið tíggju teir fyrstu mánaðarnar í ár var størri enn hallið alt árið í fjør.

Eygleiðarar leggja dent á, at hallið á amerikanska handilsjavnanum er vaksið, sjálvt um dollarin er viknaður tey bæði seinastu árini. Fallandi dollaravirðið ger amerikanskar vørur bíligari á útlendska marknaðinum, meðan tað er dýrari hjá amerikanarum at innflyta útlendskar vørur.

Tey, sum hava hugt at teimum seinastu tølun-um, siga, at tann høgi oljuprísurin og veksandi innflutningur eru høvuðsorsøkin til tað stóra hallið higartil í ár. Tað er serliga innflutningurin úr Kina, sum veksur skjótt.

## Teir fyrstu fyri rættin

Í Irak verður roknað við, at tey fyrstu rættarmálini ímóti teimum næstu monnunum hjá Saddam Hussein kunnu byrja longu í næstu viku.

Ein tann fyrsti, sum kemur fyri rættin, er Ali Hassan al-Majid ella "Kemiski Ali", sum hann ofta verður róptur, tí tað var hann, sum stóð fyri eirurgassálopinum á kurdarnar í áttatiárunum. Roknað verður eisini við, at hálvbróður Saddams, Walban Ibrahim Hassan al-Tikriti, kemur fyri rættin í næstu viku. Ein annar, sum eisini bíðar, er tann kristni varaforsætisráðharrin, Tariq Aziz.

Irakski forsætisráðharrin, Iyad Allawi, sigur, at fyrireikingarnar til rættarmálini eru komnar so mikið áleiðis, at tey fyrstu málini kunnu byrja nú. Hinvegin dugdi hann ikki at siga, nær Saddam Hussein sjálvur kemur fyri rættin.

Síðani kríggið hava irakar og amerikanarar leitað eftir ymsum, sum skal nýtast sum próvtilfar í teimum komandi rætt-armálunum. Eitt nú eru fleiri hópgravir funnar í seinastuni, og tær verða ætlandi liður í próvførsluni ímóti gamla stýrinum í Bagdad.

## Færri verjuskip

Norska stjórnin hevur gjørt av at spara so mikið innan sjóverjuna næsta ár, at eitt av skipunum hjá vaktartænastuni noyðist at liggja við bryggju helvtina av 2005.

Ovastin fyri sjóverjuni, Geir Osen, sigur við blaðið Nordlys, at sjóverjan hevur gjørt av at leggja skipið "Senja" frá 1. februar, og at tað verður liggjandi við bryggju til 1. august. "Senja" er eitt av teimum fýra stóru skipunum, sum norska sjóverjan hevur. Geir Osen sigur, at játtanin, sum sjóverjan fær næsta ár, røkkur ikki til øll tey fýra skipini, og tí má eitt teirra liggja helvtina av árinum.

Geir Osen dylir ikki fyri, at hann heldur tað vera neyðugt við øllum fýra skipunum, men at sjóverjuleiðslan noyðist at halda seg til tað, sum politikarnir siga.

## Treholt á russiskum

Russar hava eftir øllum at døma ikki gloymt norðmannin Arna Treholt, sum bleiv tikin fyri 20 árum síðani og dømdur fyri at hava njósnast til frama fyri Sovjetsamveldið.

Á einari bókamessu í Moskva fyrr í hesum mánaðinum kunngjørdu trý russisk forløg, at tey høvdu gjørt av at geva út eina russiska týðing av bókini "Gråsoner", sum Arne Treholt hevur skrivað. Í bókini heldur viðgongur høvundurin, at hann hevði samband við sovjetskar njósnarar, men hann heldur uppá, at hann var ikki sekur í njósning.

Arne Treholt fekk grið í 1992.